*Lagt til rættis:*
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

# Floksformenninir ha



## Anna: Mítt ískoyti liggur á heimafrontinum

Mynd: Kalmar Lindenskov

*Ert tú spent til valið?*
Við tað at Føroyar eru eitt valdømi, so vænti eg eitt annarleiðis og sera spennandi val.

*Hevur tú eisini ein leiklut sum ráðgevi hjá Jenis?*
Vit tosa nógv saman um, hvat rørir seg í samfelagnum, og eg komi eisini við góðum hugskotum og ráðum, sum eg meira enn so kenni aftur. Eisini biði eg fyri honum.

*Aftaná valfundir og valsendingar. Plaga tú og Jenis at gera eina eftirmeting saman?*
Ja, altíð - hvussu kom tann politiski boðskapurin fram? hvussu førdi hann seg fram? hvussu var klædnastílurin? hvussu megnaðu journalistarnir/orðstýrarin sín leiklut?

*Hvat er títt hjartamál í hesum valstríðnum?*
Familjupolitikkurin: leingja barnsburðarfarloyvið til 52 vikur. Gera tað lagaligari at seta búgv.
Betri kor fyri einligar mammur. Minka gjónna millum rík og fátøk.
Heilsu- og almannapolitikkurin: játtaði peningurin má koma brúkaranum til góðar. Betri arbeiðsumstøður fyri heilsustarvsfólkið, bæði innan sjúkhúsverkið og innan primera sektorin.
Smidligari almannaverk, er alt ov stirvið.
Andaliga: at Føroyar verða varveittar á kristna grundstøðinum.

*Brúkar tú nakra tíð og orku til at agitera fyri Miðflokkinum?*
Geri allarhelst alt ov lítið av tí, mítt ískoyti liggur á heimafrontinum, so Jenis kann hava meira tíð til politiska arbeiðið.

*Hvussu nógv fyllir politikkur við døgurðaborðið heima við hús?*
Rættuliga nógv, serliga tí synirnir eru sera áhugaðir í samfelagsligum viðurskiftum.

*Hvussu hava børnini tikið tað, at pápin er ein kendur politikkari?*
Teir eru stoltir og glaðir og geva pápanum sín fulla stuðul, hava eisini uppliva bæði stuttligar og keðiligar hendingar.

*Hvat ítriv fæst tú við, ella hvat gert tú fyri at avstressa frá politikki?*
Havi eitt arbeiði at fara til, sum eg trívist sera væl í. Mær dámar væl at lesa, at ganga, at svimja, møtist í bólki saman við øðrum kvinnum, annars dámar mær at binda og at seyma.

*Kemur tú úr einum heimi ella umhvørvi, har tey valdu sama politiska flokk, sum maður tín umboðar í dag?*
Nei, tað kundu tey av góðum grundum ikki, tí Miðflokkurin var fyrst stovnaður í 1992.

*Koma ofta ókend fólk, sum tú ikki hevur sæð fyrr í lívinum til tín á gøtuni, og byrja at tosa um politikk?*
Havi aldrin verið úti fyri tí.

*Hvørji framtíðar ynski hevur tú fyri Føroyar?*
At vit verða ein fræls tjóð, sum varðveitir okkara kristnu virðir. Vóni at Jenis verður afturvaldur, tí eg meti, at hann við sinum gløggskygni og ofta annarleiðis máta at meta um og loysa mál, hevur so nógv at geva føroysku tjóðini.

*Ert tú spent til valið?*
Ja, eg eri sera spent. Tað er jú alt øðrvísi hesaferð, so ilt er at spáa um hvussu tingið fer at verða mannað eftir valið. Mest spent eri eg tó uppá samgongumøguleikarnar.

*Hevur tú eisini ein leiklut sum ráðgevi hjá Høgna?*
Ja, tað loyvi eg mær at halda, hóast tað ikki er sett beinleiðis orð á tað millum okkara. Eg havi eisini mítt fak og mítt arbeiðsumráði, og eg vil, at Høgni skal vita alt um hvussu umstøðurnar og korini hjá fólki við menningartarni í Føroyum skulu kunna betrast og gerast virðilig. Og eg haldi, at Høgni hevur fingið eitt eitt sera gott innlit í hesi viðurskifti og hann hevur fingið persónligt samband við menniskjuni sum politikkur í síðsta enda snýr seg um.

*Aftaná valfundir og valsendingar. Plaga tú og Høgni at gera eina eftirmeting saman?*
Nei, ikki eina skipaða eftirmeting, men eg havi nærum altíð eina meining um, hvussu eg haldi at hann kláraði seg, og tað sigi eg við hann.

*Hvat er títt hjartamál í hesum valstríðnum?*
Mítt fremsta politiska hjartamál er og hevur altíð verið at, vit fólkið í Føroyum taka ábyrgd av okkum sjálvum og okkara landi. Hetta síggi eg sum eina treyt fyri at vit kunnu røkka øllum okkara hjartamálum sum hoyra til eitt samfelag har pláss er fyri øllum og øll hava líka rættindi at liva og virka.

*Brúkar tú nakra tíð og orku til at agitera fyri Tjóðveldinum?*
Beinleiðis agitatión er tað ikki, men eg eri í nógvum politiskum kjaki, og tað økjst uppundir val. Eg havi ongantíð biðið nakran um at velja nakran ávísan persón, men eg loyvi mær at siga mína meining um øll viðurskfti, ið eg haldi meg vita nakað um og havi eina meining um.

*Hvussu nógv fyllir politikkur við døgurðaborðið heima við hús?*
Vit tosa sjáldan um politik við døgurðaborðið. Ringt er at samla familjuna at sita saman við døgurðaborðið. Men tá valstríð, ítrottavenjing og kvøldskúli loyvir at vit sum familja sita við døgurðaborðið, so tosa vit um alt millum himmal og jørð.



## Hildur: Heima hjá okkum er Høgni ein vanligur pápi

Mynd: Kalmar Lindenskov

*Hvussu hava børnini tikið tað, at pápin er ein kendur politikkari?*
Tá Høgni fór upp í politikk, høvdu vit ikki ímyndað okkum at lívið skuldi broytast so nógv sum tað gjørdi og als ikki í mun til børnini. Men okkara børn eru helst sum børn flest og liva við teimum umstøðum, teimum verður bjóðað. Vit hava mangan tosað um tað at pápin er kendur, og at øll hava eina meining um pápa teirra. Tað leggur sjálvsagt eitt ávíst press á tey, men heima hjá okkum er hann bara ein heilt vanligur pápi, sum fær tær avbjóðingar sum aðrir pápar fáa.

*Hvat ítriv fæst tú við, ella hvat gert tú fyri at avstressa frá politikki?*
Eg eri so heppin at eg havi keramikk sum eg fáist við og veruliga kann avstressa við, men um tað akkurát er frá politikki, tað veit eg ikki. Í øllum førum fái eg nýggja orku, tá eg havið fingist leir. Tað er ivaleyst at politikkurin sleppur at stressa ein í familjuni.

*Kemur tú úr einum heimi ella umhvørvi, har tey valdu sama politiska flokk, sum maður tín umboðar í dag?*
Ja, heima hjá okkum hevur ongantíð verið ivi um, at Føroyar gerast eitt ábyrgdarfult samfelag, tá vit hava tikið ábyrgd av okkum sjálvum og skipa okkum sum tjóð.

*Koma ofta ókend fólk, sum tú ikki hevur sæð fyrr í lívinum til tín á gøtuni, og byrja at tosa um politikk?*
Ja, tað hendir meira enn so, til alt held er tað oftast við tí góða orðinum. Um eg eri úti í veitslulag er tað stundum møðsamt, at ikki bara kunna sleppa undan álvarstosinum og heldur tosa um onnur virðir, ið ikki eru partapolitisk heft.

*Hvørji framtíðar ynski hevur tú fyri Føroyar?*
Ynskini og vónirnar og væntanirnar eru nógvar, og tað er tengt at hvørjum øðrum. Um eg taki aftur í mítt hjartamál fyri hesum valstríðnum, so ynski og vóni eg at vit fólki í Føroyum, velja at skipa okkum sum fólkaræði.
Tá vænti eg, at hvørt einstakt menniskja tekur ábyrgd av sær sjálvum og av okkum øllum, eitt rættiligt samhaldsfast samfelag, sum kennur seg sum ein bólk har pláss er fyri margfeldni í einstaklingum, ið virða hvønn annan sum menniskju.



## Jórun: Synirnir halda sjálvsagt við »babba«

Mynd: Alan Brockie

*Ert tú spent til valið?*
Ja

*Hevur tú eisini ein leiklut sum ráðgevi hjá Kaj Leo?*
Ja, tað kemur fyri, at hann tekur míni ráð til sín.

*Aftaná valfundir og valsendingar. Plaga tú og Kaj Leo at gera eina eftirmeting saman?*
Ja

*Hvat er títt hjartamál í hesum valstríðnum?*
Skúlaverkið, sjúkrahúsverkið og eldraøkið.

*Brúkar tú nakra tíð og orku til at agitera fyri Sambandsflokkinum?*